

## Tevez skal venja í Brasil-troyggju

Tá West Ham um vikuskiftið spældi móti Sheffield United, varð Carlos Tevez í øðini um, at hann varð skiftur út. Somikið illur var hann, at hann helt beina leið av leikvøllinum, og tað dámdi venjaranum lítið, sum vera man.
Tevez var tó skjótur at biðja um umbering. Longu sama kvøld segði hann seg angra atburðin, og tað blíðkaði venjaran Alan Pardew nakað. Hesin gjørdi tí av, at liðfelagarnir skuldu gera av, hvør revsingin til Tevez skuldi verða, og nú er hamarin fallin. Og hann er fallin hart.
Sum argentinskur landsliðsspælari hevur Tevez sjálvandi Brasil sum ævigan arvafíginda. Men komandi tvær vikurnar skal hann bera brasilska landsliðsbúnan undir hvørjari venjing. Hartil skal hann rinda £1.000 til vælgerandi endamál.

# Trygvi Mortensen til KÍ

**KÍ hevur gjørt avtalu við Trygva Mortensen um, at hann skal venja 1. deildarliðið hjá felagnum**

FÓTBÓLTUR
*tíðindaskriv*

KÍ styrkir sær nú um venjarahópin við enn einum dugnaligum og royndum venjara. Tað er runavíkingurin Trygvi Mortensen, sum næsta kappingarár skal hava ábyrgdina av 1. deildarliðnum hjá KÍ.
KÍ hevur lagt eina nýggja ætlan fyri arbeiðið við teimum ungu spælarunum í felagnum, og í hesum sambandi fær 1. deildarliðið ein avgerandi leiklut.
Frammanundan er tað greitt, at Tony Paris verður venjari hjá Formulaliðnum, og har verður Eyðun Klakstein hjálparvenjari. Pætur Clementsen er settur sum ungdómsvenjari.

- Vit halda okkum hava fingið ein sera sterkan venjarahóp við dugnaligum og royndum venjarum, sum koma at samstarva um teir vaksnu spælararnar í felagnum, sigur John William Joensen, ábyrgdarfólk fyri fótbólt í KÍ.
- Vit leggja stóran dent á at menna okkara egnu spælarar, og miðvísa arbeiðið við teimum ungu spælarunum heldur fram og verður styrkt enn meira næsta ár, sigur hann
Trygvi Mortensen er 39 ára gamal, og hann hevur hægstu venjaraútbúgvingina. Trygvi hevur í fleiri umførum verið venjari hjá besta liðnum hjá NSÍ, og hann hevur eisini vant EB/Streym og B68.
Fríggjadagin 2. desember kl. 9.30 verður sáttmálin millum KÍ og Trygva Mortensen undirskrivaður í Café KÍ, og tá eru fólk vælkomin at verða til staðar og at heilsa upp á nýggja venjaran.



*Við Trygva Mortensen afturat Tony Paris, Eyðun Klakstein og Pætur Clementsen metir KÍ seg hava ein sterkan venjarahóp, sigur felagið í tíðindaskrivi*

# FM-finalurnar verða leygardagin

**Endabrakið í talvkappingini fyri børn og ung verður leygardagin í Argja Skúla. Kappingin er skipað í aldursbólkum og telvað verður um 5 FM-heiti. Og um luttøku í NM-kappingini**

TALV
*tíðindaskriv*

Umframt serliga spenningin um, hvør vinnur FM-heitini, er somuleiðis sera stórur spenningur um, hvør vinnur sær luttøkurætt til Norðurlendska meistaraheitið í talvi sum verður í Íslandi í februar mánað 2007. Nr. 1 og 2 í hvørjum aldursbólki luttaka. Kappingin er árliga hæddarpunktið hjá ungu telvarunum tí telvað verður eisini fyri møguleikanum - í ungum aldri - at sleppa uttanlands at telva ímóti javnaldrum úr hinum Norðurlondunum.
Tilsvarandi kappingar eru í hinum Norðurlondunum og senda hesi eins og Føroyar 10 teirra bestu telvarar til NM. Føroyar hava luttikið í NM fyri ung í nógv ár, men hetta er 5. árið uppí slag, at Føroyar luttekur við fullari manning og sum kunnugt hepnaðist Helga Dam Ziska á fyrsta sinni - í Finlandi í februar mánað 2006 - at vinna Føroyum NM gull í aldursbólkinum 14-16 ár.
Undankappingar hava verið í Vestmanna og Klaksvík og 8 teir stinnastu telvararnir í hvørjum aldursbólki luttaka í finaluni. Undankappingarnar bera boð um eina óvanliga spennandi FM finalu og FM/NM stríðið sýnist víðopið í flestu aldursbólkunum.
Hóast 16 ára gamli Helgi Dam Ziska hevur møguleika fyri, aftur í ár, at luttaka í U16 bólkinum, hevur hann valt at royna seg í U20 bólkinum. Hetta boðar frá hugaligum sjálvsáliti hjá stórtalentinum og Helgi er ivaleyst eisini stórfavorittur at vinna FM í hesum bólkinum. Samstundis opnar val hansara dyrnar upp fyri øðrum evnaríkum telvarum, sum harvið hava betri møguleika at kvalifisera seg til NM í U16-bólkinum. Serliga spennandi verður leygardagin, um Danmarksmeistarin frá 2006, Herborg Hansen, sum fyrsti kvinnuligi telvarin nakrantíð, megnar at kvalifisera seg til NM.



*Herborg Hansen hevur møguleika at gerast fyrsti kvinnuligi telvarin, sum vinnur seg fram til NM-kappingina.*

### Finalubólkarnir

**A-bólkur - U20 ár**

1 Helgi Dam Ziska, Tórshavn
2 Jón Gregersen, Sandavágur
3 (ongin undankapping - Opin tilmelding)

**B-bólkur - U16 ár:**

1 Herborg Hansen, Klaksvík
2 Rógvi Dragaberg, Klaksvík
3 Bogi H. Eliasen, Klaksvík
4 Margar Berg, Tórshavn
5 Reidar Egilsnes, Vestmanna
6 Borgar J. Stórá, Vestmanna
7 Jóhan R. Mortensen, Oyri
8 Vagnur Dam, Oyri

**C-bólkur - U14 ár:**

1 Rógvi Egilstoft Nielsen, Sandavágur
2 Heiðrikkur Tindskarð Jacobsen, Tórshavn
3 Hjalti Toftum Jógvansson, Tórshavn
4 Rúni Vørmadal, Vestmanna

**D-bólkur - U12 ár:**

1 Jóhann Vørmadal, Vestmanna
2 Einar Gregersen, Klaksvík
3 Jógvan Emil Joensen, Vestmanna
4 Eydna J. Andreasen, Tórshavn
5 Johan Hentze, Oyri
6 Sára T. Olsen, Tórshavn
7 Bárður J. Stórá, Vestmanna
8 Martin Skúvádal, Vestmanna

**E-bólkur - U10 ár:**

1 Høgni Egilstoft Nielsen, Sandavágur
2 Heðin Gregersen, Klaksvík
3 Rúni Tindskarð Jacobsen, Tórshavn
4 Janus Egilstoft Nielsen, Sandavágur
5 Alfred Olsen, Vestmanna
6 Julian Gregersen, Klaksvík
7 Rúni í Lon, Tórshavn
8 Dánjal K. Hansen, Tórshavn

**Hondbóltsstøður**

**Sunset-kappingin**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Neistin | 5 | 3 | - | 1 | - | 1 | 123 | 103 | 20 | 7 |
| 2 Stjørnan | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 87 | 75 | 12 | 6 |
| 3 VB | 5 | 3 | - | 0 | - | 2 | 112 | 117 | -5 | 6 |
| 4 StÍF | 5 | 1 | - | 1 | - | 3 | 108 | 120 | -12 | 3 |
| 5 Kyndil | 5 | 0 | - | 2 | - | 3 | 108 | 123 | -15 | 2 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 7 | 5 | - | 1 | - | 1 | 200 | 184 | 16 | 11 |
| 2 Neistin | 7 | 5 | - | 0 | - | 2 | 227 | 199 | 28 | 10 |
| 3 StÍF | 7 | 3 | - | 3 | - | 1 | 192 | 192 | 0 | 9 |
| 4 KÍF | 7 | 2 | - | 1 | - | 4 | 185 | 193 | -8 | 5 |
| 5 Kyndil | 7 | 2 | - | 0 | - | 5 | 196 | 205 | -9 | 4 |
| 6 H71 | 7 | 1 | - | 1 | - | 5 | 183 | 210 | -27 | 3 |